# OPIÐ BRÆV

## Til AFF

AFF - Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum - vil hava okkum at góðtaka ein sáttmála, sum hevur við sær ein lønarvøkstur, ið sannlíkt verður etin upp av inflatión, áðrenn sáttmálaskeiðið er runnið.

Vit ynskja ein ábyrgdarfullan arbeiðsgevara, sum virðir arbeiði okkara og lønir okkum hareftir.

Okkara krøv eru rímilig, tí heita vit á AFF um at koma aftur til samráðingarborðið og vísa vilja til veruligar samráðingar, sum tryggja okkum ein reallønarvøkstur.

Vinaliga

**Starvsfólkafelagið í Føroya Banka**